ÓKEYPIS SPORING VIÐ KEYP AV DEKKUM www.kollsker.com

**Vit umboða nú**

VREDESTEIN
DESIGNED TO PROTECT YOU

**VREDESTEIN er kosið besta vetrardekkið á øðrum ári**



Vit umvæla **ALLAR** skaðar og **ØLL** bilmerki

## BILVERKSTAÐIÐ

v/Hans Jacob Kollsker · Á Hjalla · Tel. 31 10 13 · Fax 32 10 15 · www.kollsker.com



Altíð tað nýggjasta

www.sosialurin.fo

## SKRIVSTOVUFÓLK

Apoteksverkið søkir eftir einum skrivstovufólki til bókhaldið at arbeiða fulla tíð.

Starvið fevnir um bókhald og annað skrivstovuarbeiði. Verður sett skjótast gjørligt, ella eftir nærri avtalu.

Neyðugt er at umsøkjarin hevur:

- góðan kunnleika til bókhalds-og roknskaparararbeiði
- skrivstovuútbúgving el. líknandi
- góðan teldukunnleika
- góð samstarvsevnir

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála við Fíggjar-málastýrið og Starvsmannafelagið.

Bókhaldsdeildin heldur til hjá Landsapotekaranum, har tað í løtuni starvast 4 fólk.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til Jonnu Djurhuus telefon 350150, teldupost: jonna.djurhuus@apotek.fo.

Umsókn saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu sendast í seinasta lagi 14.februar 2010 til:

Landsapotekarin
Staravegur 15
Postboks 3087
110 Tórshavn
www.apotek.fo

# ORKUTØKNINGUR TIL MAGN

## Vit sóknast eftir orkutøkningi til Magn Hitatænastuna í Suðurstreymi

### Um Magn

Magn tryggjar orku til Føroyar og føroyingar. Vit eru 130 starvsfólk, svarandi til 80 ársverk. Høvuðsskrivstova okkara er í Havn og deildarskrivstovur eru í Klaksvík og á Tvøroyri. 10 service støðir bera Magn navnið, av hesum eigur Magn tær 4. Vit hava goymslur í Klaksvík og í Havn, og mált uppá sølu eru vit ein av Føroya størstu fyritøkum.

### Um starvið

Hitatænastan hjá Magn tekur sær av árligum eftirliti og tænastuvakt til okkara sethúsa- og virkiskundar. Árliga eftirlitið umfatar millum annað at reinsa oljufýr og ketil, og at kanna og stilla oljufýrið. At oljufýrið er stillað rætt verður tryggjað við eftirlitsmátingum. Øll úrslit og tilmæli verða skrásett í eftirlitsbók.

### Um hitatænastuna er annars at siga:'

Tænastan er besta trygd fyri eini vælvirkandi oljufýrs-skipan, t.v.s. eingin óneyðug oljunýtsla og munandi minni vandi fyri sótskaðum við meiri. Í alt arbeiða 9 ábyrgdar-fullir, raskir og vællærdir orkutøkningar í Hitatænastuni hjá Magn, og hesir tryggja sethúsum og virkjum í øllum landinum hita allar 365 dagarnar um árið. Um skipanin óeydnutíð sløknar, er hjálpin tó skjót og nær.

### Uppgávur í stuttum:

- Árligt reins, eftirlit og at stilla størri og minni hitaverk í Suðurstreymi inn
- Tænastuvakt 4. hvørja viku
- Veita kundum okkara bestu ráðgeving um orku og orkuverk teirra
- Tryggja okkara høga tænastustøði
- Verða ein partur av framhaldandi at menna Magn hitatænastuni

### Vit bjóða:

Eitt gott, avbjóðandi og ábyrgdarfult starv í eini fyritøku í menning. Her er vítt til veggja, og um tú vilt og dugir, so sleppur tú eisini. Tað er avgerðandi, at tú ert før/ur fyri at arbeiða sjálvstøðugt, og at tú loysir tínar uppgávur væl. Av hesi orsøk fært tú góðan stuðul og alla neyðuga upp-læring og útbúgving.

### Vit vænta:

- Viðkomandi handverkaraútbúgving, so sum rørsmiðjur, maskinsmiðjur, elektrikari ella líknandi
- At tú ert tænastusinnað/ur og góð evni at samskifta og samstarva
- At tú hevur áræði og dugir at arbeiða sjálvstøðugt

### Okkara virði eru:

- Kundin í fokus
- Vitan og førleiki leingi livið
- Skjótt er gott
- Gleði gevur megi

Um tú umhugsar at søkja starvið, vinarliga fær inn á www.magn.fo og hygg nærri eftir, hvussu vit á Magn arbeiða við virðum felagsins í okkara dagliga arbeiði.

Hevur tú spurningar, vinarliga vend tær til Leif Hovgaard á telefon 347443, 237443 ella á leif@magn.fo

Umsóknir við prógvum skulu latast inn áðrenn 07. februar kl. 16:00. Antin við at senda bræv til:

**Magn**
Att: Leif Hovgaard
Vestarabryggja 10
FO-110 Tórshavn

Ella við at senda teldupost til leif@magn.fo

www.magn.fo

magn TÍN ORKA